# Hósdagur 27. apríl

7.00 **Tíðindi**
7.03 **Morgunlestur** - Erika Lómstein Petersen í Oyndarfirði lesur
7.15 **Barnaløtan** - Jonna og Katrin leggja til rættis
7.30 **Tíðindi**
7.35 **Góðan Morgun Føroyar**
8.00 **Tíðindi**
8.05 **Góðan Morgun Føroyar**
9.00 **Tíðindi**
9.05 **Morgunlestur** (e) - Erika Lómstein Petersen í Oyndarfirði lesur
9.15 **Dagsins tónar**
9.30 **Leygardag hendi onki** (e) - Páskasending hjá Armgarð Arge
10.00 **Tíðindi**
10.05 **Fimleikaløtan** - Elna & Egga skipa fyri.
10.10 **Lurtararnir og vit** - Elis Poulsen stílar fyri
11.00 **Tíðindi**
11.01 **Undir døgurða**
12.00 **Veðurtíðindi**
12.02 **Middagstónleikur**
12.15 **Skráin og lýsingar**
12.20 **Tíðindini og ítróttur**
12.40 **Døgurðatónar**
13.00 **Tónatímin**
14.00 **Tíðindi**
14.01 **Fimmarin** (e)
15.00 **Tíðindi**
15.01 **Nýtt og gott gamalt** - Høgni Zachariasen velur løgini
16.00 **Tíðindi**
16.01 **Rokkstovan** - Rasmus Rasmussen stílar fyri
17.00 **Tíðindini**
17.05 **Geykn** - Jóhannes Miðskarð og Maria Abrahamsen stíla fyri
18.00 **Barnaløtan** (e) - Jonna og Katrin leggja til rættis
18.25 **Skráin og lýsingar**
18.30 **Tíðindini**
19.00 **Í grannalagnum** - Mildrið Jacobsen leggur til rættis
19.30 **Harmonikutónar** - Flóvin Jacobsen stílar fyri
20.30 **Dalurin fagri** - 18. partur av skaldsøgu eftir Gunnar Hoydal. Hans Tórgarð lesur.
21.00 **Tíðindi**
21.05 **Vaglið**- Ginna Midjord og Bjarni Mohr leggja til rættis
23.00 **Tíðindi**

### Lindin

13.00 **Byrjan – Dagsskrá**
13.15 **Okkara dagliga breyð**
13.30 **Tónleikur**
14.30 **Barnalindin**
15.00 **Tónleikur**
17.00 **M & M's** - Sending fyri ung
18.00 **Dagsins orð**eftir Svenning av Lofti. Óla Hendrik av Fløtum lesur
19.00 **Brot og bitar** - Sending við tíðindum bæði heimanífrá og uttan úr heimi - v/ Britt Rasmussen, Eivind Bringsberg v.fl.
20.00 **Barnalindin** (e)
20.30 **Okkara dagliga breyð**(e) -
20.55 **Dagslok - Dagsins orð**eftir Svenning av Lofti
21.00 **Bønarlinjan** - er opin frá kl. 20 og úteftir
24.00 **Vit gevast**

### Rás 2 FM 102

8.00 **Morguntónleikur -** Lættur blandaður tónleikur
9.45 **Orðið** Bíbliulestur v/ Anju Hansen
10.00 **Kaffi** - Morgunsending við ymsum úr bløðunum, veðurlagnum, koyrilíkindum, matarskránni o.ø. - Sonne Smith leggur til rættis
11.00 **Birgir Beinleiðis**- Beinleiðis sending við tónleiki og práti. - Birgir Sondum leggur til rættis
12.00 **Tíðindi**
12.15 **Dansitónleikur fyri vaksin v/Ronald (8)**
13.00 **Føroyskur tónleikur**
14.00 **Laila Beinleiðis**- Beinleiðis countrysending
15.00 **Tíðindi**
15.15 **Lættur tónleikur**
16.00 **KT R@sin** - Kunnandi ungdómssending fyri ung og eldri. - Um kunningartøkni í víðastu merking í samstarvi við Føroya Tele.
17.00 **Barnaløtan**
17.30 **Barnasangir**
18.00 **Tíðindi**
18.15 **Lættur tónleikur**
19.00 **Hans og Dýrini** - Um fuglin í bjørgunum, sílini í ánni, kettur og hundar og onnur dýr.. - Hans Joensen prátar við fólk um náttúru og umhvørvi.
20.00 **Poppur -** Frá fyrr ella seinni
21.00 **Tíðindi**
21.15 **Orðið**(e) - Bíbliulestur v/ Anju Hansen
21.30 **GirlZone -** Beinleiðis ungdómssending við gestum. - Anita Ottosen og Súsanna Clementsen leggja til rættis. - Telefon: 35 99 99, fax 35 99 90 ella E-mail: ras2@ras2.fo

### svf

18.15 **Upp á tá**— fimleikur í SvF
18.30 **Øskufía** 16:26
19.00 **Krosskast** (e)
20.00 **Dagur og Vika** við Grannum okkara
20.50 **Eiturkoppurin** 1:6 — danskt krimi- og kærleiksdrama - Óhóskandi fyri smábørn
21.50 **Krimitímin: Ruth Rendell: Mutur og glatan** 2:2
22.40 **Ferðafrásøgn: Zimbabwe, Botswana og Namibia**
23.30 **Liðugt**

### Eurosport

7.30 **Motorcycling**
9.00 **Football**
10.30 **Snooker**
11.30 **Superbike**
12.00 Live - **Tennis**
15.30 **Weightlifting**
16.00 Live - **Weightlifting**
16.30 **Adventure**
18.00 **Motorsports**
19.00 **Football**
19.30 **Snooker**
21.00 **Football**
23.00 **Motorsports**
0.00 **Bloopers**
0.30 **Close**

### 3

5.00 **Børne-hjørnet med Disney**
7.05 **TV-shop**
9.00 **Hvide Løgne**
9.25 **Alle tiders barnepige**
9.55 **Baywatch**
10.50 **Horton-sagaen**
11.40 **Horton-sagaen**
12.30 **I lyst og nød**
13.00 **Sjov og Spas**
13.25 **Panter-tanter**
13.55 **Det lille hus på prærien**
14.50 **Interne affærer**
15.45 **Sjov og Spas**
16.15 **Ricki Lake**
17.10 **Dagens Nyheder på TV3**
17.20 **Sportsnyheder**
17.25 **Vejret**
17.30 **Alle tiders barnepige**
18.00 **Vild med dig**
18.30 **Hvide Løgne**
19.00 **Family Law**
20.00 **Jacob og Lotte på nye eventyr**
20.35 **Modelliv**
21.05 **Heksene fra Warren Manor**
22.05 **SexOrama**
22.40 **Dagens nyheder på TV3**
22.50 **I lyst og nød**
23.20 **Vore værste år**
23.50 **Ti tommelfingre**
0.20 **Monty Pythons flyvende cirkus**
0.55 **Ellen**
1.25 **far er major**
1.55 **Caroline, karrieren og kærligheden**
2.25 **Viruskrigerne**
3.20 **Hvide Løgne**
3.50 **Godnat**

### BBC World

0.00 **News – Weather**
0.30 **HARDtalk**
1.00 **News – Weather**
1.30 **The Travel Show**
2.00 **News – Weather**
2.30 **Reporters**
3.00 **News – Weather**
3.30 **Asia Today**
3.45 **World Business Report**
4.00 **News – Weather**
4.30 **HARDtalk**
5.00 **News – Weather**
5.30 **Top Gear**
6.00 **News – Weather**
6.30 **The Money Programme**
7.00 **News – Weather**
7.30 **HARDtalk**
8.00 **News – Weather**
8.30 **Talking Movies**
9.00 **News – Weather**
9.30 **The Money Programme**
10.00 **News – Weather**
10.30 **HARDtalk**
11.00 **News – Weather**
11.30 **The Travel Show**
12.00 **News – Weather**
12.30 **The Money Programme**
13.00 **News – Weather**
13.30 **HARDtalk**
14.00 **News**
14.15 **World Business Report – Weather**
14.30 **Top Gear**
15.00 **News – Weather**
15.30 **The Money Programme**
16.00 **News – Weather**
16.30 **Asia Today**
17.00 **News**
17.15 **World Business Report – Weather**
17.30 **Talking Movies**
18.00 **News – Weather**
18.35 **World Business Report**
18.45 **World Sport**
19.00 **News – Weather**
19.30 **HARDtalk**
20.00 **News – Weather**
20.30 **Click Online**
21.00 **News – Weather**
21.30 **World Business Report**
22.00 **News – Weather**
22.30 **Surrender in Saigon**
23.00 **News – Weather**
23.30 **World Business Report**
23.45 **Asia Today**

### BBC Prime

0.00 **TLZ: »Horizon – Bones of Contention«**
1.00 **TLZ: »Maths File«**
1.30 **TLZ: »Seeing through Maths«**
2.00 **TLZ: »The Psychology of Addiction«**
2.30 **TLZ: »Development Aid«**
3.00 **TLZ: »Living with Crack«**
3.30 **TLZ**
4.00 **TLZ: »Spain inside out – Cities of the South«**
4.30 **TLZ: »Mexico Vivo – Para Todos los Gustos«**
5.00 **TLZ: »The Business Hour«**
5.30 **TLZ: »Look ahead«**
6.00 **Dear Mr. Barker**
6.15 **Playdays: »Playground Stop«**
6.35 **Run the Risk**
7.00 **The Biz**
7.30 **Going for a Song**
7.55 **Style Challenge: »Short Ladies«**
8.20 **Real Rooms: »Wirral Bathroom«**
8.45 **Kilroy: »My Phobia«**
9.30 **EastEnders**
10.00 **Antiques Roadshow**
10.30 **Great Antiques Hunt: »Birmingham«**
11.00 **TLZ: »The Photo Show«**
11.30 **Can't cook, won't cook**
12.00 **Going for a Song**
12.25 **Real Rooms: »High Wycombe Boys Bedroom«**
13.00 **Style Challenge: »Short Ladies«**
13.30 **EastEnders**
14.00 **Gardeners' World**
14.30 **Can't cook, won't cook**
15.00 **Dear Mr. Barker**
15.15 **Playdays: »Playground Stop«**
15.35 **Run the Risk**
16.00 **The Biz**
16.30 **Top of the Pops Classic Cuts**
17.00 **Only Fools and Horses: »The Longest Night«**
17.30 **The Antiques Show**
18.00 **EastEnders**1
18.30 **Vets in Practice: »On Call«**
19.00 **Dinnerladies**
19.30 **Chef: »Do the right Thing«**
20.00 **Casualty: »Burnt out Hearts«**
21.00 **Goodies: »The Goodies - Almost Live«**
21.30 **Top of the Pops Classic Cuts**
22.00 **The Student Prince**
23.35 **Songs of Praise**

***Lindin – Hósdagur kl. 21.00:***

## Bønarlinjan

Hóskvøld er bønarlinjan í Lindini opin frá kl. 20 og úteftir. Bønarevnini, sum eru eini 30–40 eru um ymisk evni, frá forbøn um grøðing, um íbúðarneyð, rúsevnistrupulleikar og ynski um umvending. Í bønarrúminum sita forbiðjarar, meðan verturin



Jenis av Rana saman við gesti senda beinleiðis úr útvarpsstovuni

***SvF – Hósdagur kl. 20.50:***

## Eiturkoppurin 1:6

– Danskt krimi- og kærleiksdrama

Keypmannahavn 1949. Tá tann ungi, idealistiski journalisturin, Bjarne Madsen, fær eina ábending um skipaðan kriminalitet og keyp og sølu á svarta marknaðinum, ger hann av at kanna málið. Tann høgt metti kriminalreportarin H.C. Vissing roynir at steðga honum, men Bjarne er óttaleysur, eisini tá nógv týðir uppá, at sambandi er millum undirverðina í Keypmannahavn og leiðsluna í løgregluni.

Leikrit: Lars Kjeldgaard.
Leikstjórn: Ole Christian Madsen.
Filmurin er óhóskandi fyri smábørn.



***TV3 - Hósdagin kl. 20.00:***

## Jacob og Lotte på nye eventyr

Jocob Haugaard og Lotte Heise vitja Barcelona

Jacob syngur á gøtuni, og Lotte tekur tarvin við hornunum, tá tey bæði vitja í Barcelona. Býurin setti seg veruliga á heimskortið, tá summarolympiadan varð hildin har í '92, men ígjøgnum fleiri hundrað ár hevur býurin eisini havt alstóran týdning fyri Spania. Jacob og Lotte vitja stórbýin, og tey bæði uppliva nógv á ferðini.

Jacob er millum annað inni á Camp Nou, heimavøllinum hjá F.C. Barcelona, har hann fær loyvi til at vaska nøkur av teimum 120.000 áskoðaraplássunum, eins og hann sleppur at koyra við kritmaskinuni.

Samstundis er Lotte á vitjan í dýru handlunum, umframt at hon vitjar á einum lokalum



skúla fyri tarvafektarar, har hon fær loyvi til at spæla tarvur.

At enda vitja tey fínastu matstovuna í býnum, har Jacob bjóðar Lotte ein døgurða.

***TV3 - Hósdagin kl. 20.35:***

## Modelliv



Stine skal gera nýggjar royndarmyndir, men fotografurin heldur, at hon er alt ov óseriøs.

Anne er til casting hjá einum enskum felag, men Jaqueline er bangin um hetta, tí Anne ikki altíð heldur tær avtalur, sum hon hevur gjørt.

Ivin hjá Nadia hvørvur, tá hon fær loyvi til ganga á framsýningum, men hesa vikuna átti hon heldur at hugsa um skúlagongd og søguuppgávu sína.

Jaqueline hevur føðingardag, men hon hevur úr at gera, m.a. tí hon skal leggja framhaldandi yrkisleiðinga hjá Laura til rættis og Katrine er til upptøkur fyri eitt konufólkablað, har hon gongur í summarklæðum.

***TV3 - Hósdagin kl. 22.05:***

## SexOrama

Hvussu hava tey ungu sex í dag, og hevur tað yvirhøvur nakra ávirkan, at somikið nógv av sex er at síggja á alnetinum, sjonvarpinum og í bløðum? SexOrama hyggur nærri at teimum ungu í ár 2000, sum júst nú skulu gera sínar royndir við sex og erotikki. Vit síggja nakrar tineygjarar, sum fara til náttarlívið í Keypmannahavn, og eisini verður tosað við Stine frá Århus, sum starvast sum nakinmodel og strippari. Esini síggja vit 19 ára gamla Adam, sum kundi hugsa sær at gjørt eina myndarøð og at enda verður eisini tosað við nøkur ungfólk frá hvítusunnusamkomuni, sum framhaldandi standa fast við, at sex er nakað, sum hoyrir hjúnalagnum til.










**Gerandisdagurin hjá teimum við kassan er fullur av reiðum peningi. Men eisini tað gerst ein vani**



**Eilen Olsen, sparikassaassistentur, avgreiðir býráðsformannin í Runavík, sum eisini hevur konto í Føroya Sparikassa**

-Mann blívur kanska nakað einsporaður, smílist Eilen sjálvironisk, og viðgongur í somu vend, at tað ikki altið er so lætt at seta seg út um tann trygga og vanabundna arbeiðsdagin.

-Mann heldur, at øll hava tað, sum tú sjálvur. Tað kann vera ringt at seta seg inn í støðuna hjá øðrum, t.d. hjá sjómonnum, tá ið tú sjálv ert von við, at alt liggur í føstum karmum.

**Ræðast ikki rán**

Eins og aðrir peningastovnar er Sparikassin fyrireikaður til rán. Starvsfólkini smílast bara loyndarfull, tá ið vit kaga undir diskin og fregnast eftir kontaktini, sum skal seta alarmin í gongd.

Tey hava lært, hvussu tey skulu bera seg at. Kemur ein rænari í sparikassan skulu starvsfólkini eftir førimuni royna at meta um útsjóndina og støddina á honum, m.a. við at peila av okkurt punkt nærhendis rænaran. Annars skulu tey bara vera rólig og lata vera viå at loypa framav.

Kinna minnist væl tíðina eftir bankaránið í Kollafirði í 1985. Tá stóð nógv á Kinnu og teimum, serliga tí bankarænararnir ikki vórðu handtiknir fyrr enn langt eftir, at brotsverkið varð framt.

-Tankin er ógvuliga fjarur, sigur Eilen.

- Her eru so nógv fólk, at tú gevur tær ikki far um tað, sigur hon.

**Pengar ongin lukka**

Sambært Eilen, verður tú hvørki pengagrískur ella stórkapitalistur av at sita og telja pengar dag út og dag inn.

-Eg veit ikki rættiliga, hvat eg haldi um pengar, sigur Eilen og letur spurningin sorna eina løtu. - Teir geva so ikki lukku, staðfestir hon.

-Pengarnir, sum eg havi um hendi, síggi eg ikki sum pengar. Eg ansi bara eftir teimum og syrgi fyri at kassin stemmar. Tá ið eg fái eitt sovorðið bunti við 100.000 krónum upp í hendi, so umseti eg tað ikki til veruligt virði. Eg hugsi ikki sum so: Her er ein bilur!

Størsta upphæddin, Eilen hevur goldið út kontant lá um 200.000 krónur. Hetta var um tað mundið, tá ið Sjóvinnubankin var um at fara av knóranum og fólk vóru bangin fyri at missa sítt. Kundin vildi hava pengarnar kontant - í donskum seðlum. Og tað fekk hann.

Ongantíð í síni tíð í Sparikassanum minnist Kinna, at nakar er komin í illsinni eftir uppsparingini. Oftast eru fólk í góðum lag. Eisini maðurin, sum Kinna nú fer at avgreiða.

- Vælsignaða gev mær 1.000 krónur; mappan er tóm, sigur hesin fryntligi maðurin um fimti ára aldur.

- Ja, tað gongur ikki, ha, svarar smílandi Kinna innafyri kassa 3, meðan hon fyrst trýstir upphæddina og síðani kontonummarið inn á telduna.

Nøkur fá sekund seinni er mappan hjá manninum aftur á tremur við hundraðkrónuseðlum.

- Leggja tær í, sleppa kvinnurnar uppeftir í pengaverðini, heldur Eilen. Men treytin er, at tú stútt og støðugt gongur í skúla og tað hevur Eilen ongan hug til. So vil hon heldur vera assistentur og hava tíð til síni mongu frítiðarítriv.

**Vanabundið arbeiði**

Tað slepst ikki undan, at tú verður eitt sindur vanabundin, tá ið tú hevur sitið við ein pengakassa í nógv ár og og talt millíónir av pengaseðlum.

Tá ið Eilen Olsen spælir Matador syrgir hon altíð fyri, at allir pengaseðlarnir venda sama veg. Og eisini í hennara egnu mappu liggja pengarnir í penum ordan.